


*Nr. 20* *29. september 2013* *73. árg.*

# Eg frið havi funnið í tær, Harri Krist

*Far frá mær, Harri, tí at eg eri ein syndigur maður! Luk. 5,8.*

Í gomlum døgum komu menniskju í syndaneyð. Tey gjørdust bangin fyri at glatast.Tey grótu um sín vesældóm. Tey kendu ein sting í hjartað og allir spurningar høvdu onki at týða í mun til henda eina: Hvat skal eg gera, so eg kann verða frelstur? – Um Gud er góður móti ótakksomum og óndum menniskjum, er onki at óttast. Syndaneyð er har, sum lógin ræður, ikki í náðinnar ríki. Tí er ongin orsøk at syrgja um, at syndaneyð í okkara tíð er eitt meira sjáldsamt hugtak.

Er hetta satt? – Sagt verður um Símun Pætur, sum hevði upplivað eina sjáldsama fiskiveiði á alljósum degi, at ”ræðsla kom á hann og allar, sum við honum vóru, av hesi fiskaveiði, sum teir høvdu fingið.” Hann fall á knæ fyri Jesusi og segði:”Far frá mær, Harri, tí at eg eri ein syndigur maður.” Tað byrjaði altso ikki við syndaneyð. Tað byrjaði við hesi ómetaligu ávirkan av Jesu góðsku og veldi. Men syndaneyðin og óttin komu. At geva eina psykologiskt rætta frágreiðing í Pætursa sinni er ómøguligt; Hann dugdi heldur ikki sjálvur at greiða frá tí, men sannleikin er, at hann sá seg sjálvan sum ein syndigan mann; hann kom í syndaneyð.

Ikki skal gerast nakað skema, sum øll mugu rætta seg eftir. Hvat kemur fyrst? Er syndaneyð ein fyritreyt fyri at fáa lut í Guds náðar orði? Ella er tað soleiðis, at Guds miskunn í Jesusi Kristi noyðir okkum at siga: ”Nú eg kenni áður dulda, harðskap mín og hjartakulda.” Ikki ber til at gera eitt skema, men við góðari grund kann verða spurt: Hví boyggir fólk í okkara tíð ikki knæ fyri Jesusi? Hví ræðast tey ikki fyri at glatast? Hví er tað sjáldan, at vit møta nøkrum, sum veit um at vera í syndaneyð? Hví er anfektilsi

eitt ókent hugtak? – Hesir spurningar mugu kunna svarast. Kennir tú rætta svarið?

*Men fyrst kom ein tíð*
*við ótta og iva og ófriði í;*
*í mær bert ein avgrund av synd var at sjá,*
*og hóttandi gudsboðið yvir mær lá;*
*tá fátækur var eg, ei hjálp var í nánd,*
*ei frelsandi hond.*

*Tá hoyrdist ein rødd,*
*og tá fann eg frið, og mín sál hon var grødd:*
*"Hví bert tú tann ótta um syndara neyð?*
*Lít tú tó á hann, sum leið syndara deyð',*
*á Jesus, tín Harra, sum boð tær jú ber:*
*"Sí fullgjørt tað er!""*

*So er tað tá vist,*
*eg frið havi funnið í tær, Harri Krist!*
*So tori eg trúgva, at Gud elskar meg,*
*at Jesusar blóð mína synd sónaði.*
*Eg halli meg at tær, eg falli á knæ*
*við Golgata træ!*

# Rætt honum kvittanina

**Emanuel Minos**

Undir krígnum, tá ið Noreg var hersett, høvdu vit ikki loyvi at ferðast meir enn tríggjar míl. Tað vóru torførar tíðir hjá pápa, sum var prædikumaður. Men so fingu vit nakrar útpostar frá Filadelfiasamkomuni í Oslo, sum vit skuldu røkja. Pápi og eg býttu hesar postar millum okkara. Eg fekk tveir, Holtet og Abildsø, hóast eg bara var 15 ára gamal. Fólk sluppu ikki at fara í dans ella biograf, alt var bannað, og so fóru tey á møti staðin fyri, og vit upplivdu veking.

Eitt húski, sum kallaðist Johnssen, varð frelst. Eg nevni eftirnavnið hjá teimum, tí tey eru heima hjá Harranum nú, fornøvnini minnist eg ikki. Konan varð fyrst frelst, síðani maðurin og so sonur teirra. Konan bjóðaði okkum at hava húsmøti hjá teimum. Hon var so eldhugað, sum bara ein nýfrelstur kann vera.

Á einum húsmøti vitnar konan og sigur, at steikipannan hjá teimum var brotnað. Hon sigur so við mannin: “Nú mugu vit biðja Gud geva okkum eina nýggja steikipannu.”

“Vit kunnu ikki plága Gud við einari steikipannu,” helt maðurin fyri.

“Hevur tú onga trúgv? Ert tú ikki vorðin frelstur? Gud kann gera alt,” svaraði konan aftur.

So teskaði maðurin til mín: “Veitst tú, kona mín er so treisk, at tá ið hon fyrst byrjar, gevst hon ikki, so fyri at fáa húsfrið, segði eg: Ja, ja, ja.”

Tey tóku so sporvognin inn til Oslo til tann stóra handilin Glasmagasinet. Tey vóru tey fyrstu, sum vóru uppseld. Hetta var í 1943.

Konan sigur so við krambakallin: “Hava tit eina steikipannu?”

Hann stóð tigandi eina góða løtu og bara stardi at henni. So segði hann: “Frúa, vit hava langt síðani selt allar og eru í uppisetri. Men ein steikipanna er eftir uppi á lagrinum. Eingin hevur spurt eftir hesi pannu; men eftir sum tygum spyrja, so skulu tygum fáa ta allarseinastu steikipannuna, sum vit eiga.”

So fekk hon steikipannuna, og tey tóku sporvognin heim aftur. Hon var so upplyft og glað. “Sært tú,” segði hon við mann sín, “Gud svarar bønum.” Hon var so sæl, at maðurin næstan ikki fekk hildið henni í friði har inni í sporvogninum. Hon lovaði og prísaði Gudi.

Tá ið tey komu til hús, setti hon steikipannuna á komfýrin og fall á knæ og lovaði og prísaði Gudi - og so bleiv hon doypt í Heilaga Andanum - uppi yvir einari steikipannu! Maðurin fellur so á knæ, og so verður hann doyptur í Heilaga Andanum. Tá ið sonurin kemur úr skúla, liggja bæði foreldrini á knæ á køksgólvinum og lova og prísa Gudi. Tey tosa ikki norskt, og sonurin spyr, hvat ið hetta er fyri nakað? Tey siga, at tey eru doypt í Heilaga Andanum. So fellur sonurin á knæ, og tá verður hann eisini doyptur í Heilaga Andanum.

Vinir mínir, vit hava ein máttmiklan Gud, sum svarar bønum. Hann svarar í stórum og smáum upp á tað, sum viðurferst okkum í gerandisdegnum. Langt frammanundan, at bønin varð biðin, hevði hann gjørt tað so, at ein panna var eftir, og at eingin kom at spyrja eftir henni, so at henda konan, ið leit fult og heilt á hann, skuldi fáa hana. Men vit mugu senda kvittanina fyri bønarsvarið uppaftur til Himmals. Fyrr, tá ið postboðið kom við einum pakka, segði hann: “Skriva undir her og kvitta fyri, at tú hevur fingið pakkan.” Vit mugu ikki gloyma at lova og takka Gudi fyri bønarsvar.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Hann, Gud, kann meira enn alt. *e.c.* ums.

# At kenna Harran

*Eg gevi teimum hjarta at kenna meg, at eg eri Harrin; teir skulu vera fólk mítt, og eg skal vera Gud teirra, tá ið teir venda um til mín av heilum huga.*

*Jer. 24,7.*

Tað er við hjartanum, vit kenna Gud, við kenslum okkara og vilja okkara. At upplýsa hjartans eygu okkara, so vit fáa kunnleika um hann, skrivar Paulus ápostul í Ef. 1,18. Og tann, sum ikki elskar, kennir ikki Gud, tí Gud er kærleiki, men tann, sum elskar, kennir Gud og kennist við hann.

Um okkurt óvinsælt er í tær, órógvar tað kunnleika tín um hann, eins og skitin rútur órógvar vakurleikan úti.

Men at kenna Gud er ein gáva. Vit skulu hava vilja at taka við henni, biðja um hana og taka alt burtur, sum forðar Gudi at geva okkum hana.

Vit skulu kenna hann sum Harran, hin óbroytiliga og kærliga. Hann vil frelsa frá tí illa. Eru vit yvirtikin av synd og vesaldómi og mótfallin, og vit fullu í eina freisting, skulu vit kenna hann sum tann, sum ikki er bilsin og heldur aftur sítt tolmóð og sín kærleika. Hann vil frelsa syndarar. Harrin vil fyrigeva tí, sum angrar, og endurnýggja sín sáttmála við hann.

Hetta dregur syndaran aftur frá evsta marki jarðar og lærir hann at fylgja Harranum í takksemi og við einum hjarta, sum tilbiður.

*t.* týddi.

# Eitt vakurt svar

Fyri mongum árum síðani var ein munkur á ferð. So kom hann til ein kleysturskúla. Tá ið hann kom inn, læt lærarin hann sleppa at spyrja børnini.

"Sigið mær børn, hvat ríki hoyrir hesin pengin til!" "Til metalríkið!" rópaðu børnini!"

"Púra rætt! Og hetta?" helt hann fram og tók eitt súrepli úr lummanum. "Til planturíkið!" svaraðu børnini.

"Púra rætt," smíltist munkurin . "Men sigið mær so, hvat ríki eg hoyri til?" Tá hugdu børnini smæðin hvørt upp á annað. Ongin tordi at siga til dýraríkið. Bara ein lítil drongur reistist og svaraði: "Til Guds ríki!"

Tá ið munkurin hoyrdi hesi orðini, græt hann, legði hondina á høvdið á dronginum, hugdi inn í eyguni í honum og segði: "Ja, doypt og trúgvandi menniskju hoyra til Guds ríki!"

Hesin munkurin æt Martin Luther.

*t.* týddi.

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74